Limablað nr. 9 • 2024

# Eldri

Landsfelag Pensjónista



GREIN UM DÓPSKJÓLAR

ELDRADAGUR Á TOFTUM

VÁRDAGUR Í SMS

**Blaðið Eldri**
Einaferð um árið gevur Landsfelag Pensjónista út blaðið Eldri. Endamálið við blaðnum er at kunna pensjónistar og onnur um ymiskt, ið áhugavert er hjá eldri, heima sum uttanlanda, at lesa.

**www.eldri.fo**

**Ábyrgd**
Beate L. Samuelsen, forkvinna

**Samskipari**
Gunnleyg Durhuus, skrivari og samskipari

**Umbróting**
Grafikmaster / Kári við Rættará

**Prent**
Føroyaprent

**Forsíðumynd**
Alfred Olsen og Margreta Jóhansdóttir

**Landsfelag Pensjónista**
Landsfelag Pensjónista er felag fyri allar pensjónistar og øll eldri í Føroyum. Limir í Landsfelagnum eru pensjónistafeløg og eldrafeløg í Føroyum. Landsfelagið hevur til endamáls at arbeiða fyri fíggjarligum, sosialum, mentanarligum og øllum øðrum áhugamálum pensjónista.

**Landsfelag Pensjónista**
**Løkjatún 1,**
**FO-160 Argir**
**Tel: 21 93 94**
**T-postur: lp@eldri.fo**
**Heimasíða: www.eldri.fo**

# INNIHALDSYVIRLIT

AÐALFUNDUR HJÁ LANDSFELAG PENSJÓNISTA ........ 3
IKKI KNARR, MEN RAMUR VERULEIKI ........ 4
ANDAKTIN ........ 6
FRAMSÝNING AV DÓPSKJÓLUM ........ 8
SMAKKURIN AV GRAN CANARIA ........ 14
ÁRSVEITSLAN ........ 24
ELDRADAGURIN ........ 30
VITJAN Í SUÐUROYNNI ........ 36
VÁRDAGA-TILTAK Í SMS ........ 37
PENSJÓNISTAFELAGIÐ HUGNI ........ 38
KØKUUPPSKRIFTIR ........ 40
PENSJÓNISTAR SNÝTTIR FYRI PRÍSJAVNING AV SAMHALDSFASTA ........ 41
AVSLÁTTARAVTALUR ........ 42
PENSJÓNISTA- OG ELDRAFELØG Í FØROYUM ........ 46

# LANDSFELAG PENSJÓNISTA HEVÐI AÐALFUND 20. APRÍL 2024

Aðalfundurin hjá Landsfelag Pensjónista hesaferð varð hildin á Hotel Brandan og nógv fólk møttu til aðalfundin.

Forkvinnan Beate L. Samuelsen beyð vælkomin og legði ársfrágreiðingina fram, har ættiliga nógv hevur verið á skránni síðsta árið. Gott kjak var á fundinum og síðan var nevndarval á skránni.

Tveir nevndarlimir og tríggir varalimir stóðu fyri vali.

Í nevndina vórðu vald: Erhard Jacobsen, Vága Pensjónistafelag og Jákup Andreasen, Eldrafelagið Vesturskin.

Sum varalimir vórðu vald: Maria Olsen, Pensjónistafelagið Hugni, Elna Lamhauge Strøm, Pensionistafelagið í Havn og Annvør Jacobsen, Eldrafelagið á Eiði.



***Aftast frá vinstru: Erhard Jacobsen, Jákup Andreasen og Alfred Olsen. Fremst frá vinstru: Ingeborg Vinther og Beate L. Samuelsen.***

Aftaná aðalfundin skipaði nevndin seg soleiðis:
Beate L. Samuelsen, forkvinna
Ingeborg Vinther, næstforkvinna
Alfred Olsen, nevndarlimur
Jákup Andreasen, nevndarlimur
Erhard Jacobsen, nevndarlimur

# Leiðarin: Ikki knarr, men ramur veruleiki



**Eingin orsøk at hækka pensjónsaldurin fimta hvørt ár**

*Tekstur: Beate L. Samuelsen*

Skotið verður pensjónistum í skógvarnar, at vit knarra um alt. Hartil er at siga, at talan ikki er um knarr, men um rættvísi.

At t.d. pensjónin eigur at fylgja við økta prísvøkstrinum í samfelagnum, er ikki knarr, men ein sjálvfylgja.

At geva lokalum verkføllum, kríggi úti í víðu verð og veðurlagsbroytingum skuldina fyri príshækkingum er so deiliga lætt.

Pensjónistar fingu ikki í vár nakran ágóða av lønarhækkingunum, ið fakfelagsbólkar fingu aftaná drúgt verkfall. Tað fáa vit ongantíð. Tvørtur ímóti. Vit gjalda sanniliga okkara part av almennu lønarhækkingunum, uttan at nakar hugsar um okkum.

Tað ørkymlar. Við hesum gerast vit sum pensjónistar uppaftur størri eftirbátar í gerandislívinum, har nógv í okkara veksandi aldursbólki ikki fáa tað fíggjarliga at mala runt.

Hetta er ikki knarr, men tann rami veruleiki, sum rakar nógv fólk meint. Her hugsa vit ikki einans um okkum sum pensjónistar, men eisini um húsarhald yvirhøvur og kanska serliga barnafamiljur.

## Logistikkurin ikki í ordan

Tá fólk ikki hava ráð til heilsugóðan mat, hendir lættliga, at tað gongur út yvir heilsuna hjá veikum og eldri fólki. Tey gerast sjúk. Tey vilja ikki fara til lækna. Óttin um okkurt álvarsligt lúrir og forðar av somu orsøk fyri skjótari viðgerð. Tá kann meiri enn so henda, at ov seint er. Harafturat kemur, at nógvur heilivágur er alt ov dýrur.

Ein sjúkrahúsinnlegging er ikki bara sum at siga tað. Logistikkurin í hinum endanum, tá talan er um útskriving, er eitt stórt apparat, sum skal í gongd. Nógvir heilsumyndugleikar skulu upp í leikin. Endurvenjing, pleyguheim, heimahjálp, heima-sjúkrasystraskipan, o.s.fr. skal alt samalt verða tøkt.

Og er tað tað? Nei, verri enn so til at nøkta tørvin. Alt haltar afturút. Heilsuverkinum vantar útbúgvið fólk.

Haraftrat kemur, at eingin peningur flutti við, tá landsstýrið í 2015 gjørdi av at flyta alt eldraøkið út til kommunurnar.

## Reyðblinkandi ráðgevaraperur

Annars var ein avtala gjørd millum landsstýrið og kommunurnar fyri nógvum árum síðani, at kommunurnar skuldu yvirtaka alt barnaøkið, og landið skuldi hava ábyrgdina av øllum eldraøkinum.

Nakni sannleikin er, at eldraøkið er vaksið upp um høvdið á landspolitikarunum, tí vit gerast fleiri og fleiri fyri hvønn dag, ið gongur. Ein gongd, sum vit hava vitað um í fleiri ár.

Fyri at loysa hendan fyri landið stóra trupulleika, hava reyð-blinkandi ráðgevaraljósperur billað politikarum inn, at loysnin er at seta pensjónsaldurin upp. Hann fór longu 1. juli 2024 upp við einum hálvum ári sambært nýskipanar pensjónslógini.

Síðani skal hann so líðandi fara upp við hálvum ári aftrat fimta hvørt ár.

Tað hevur løgtingið samtykt.

## Pensjónistar ikki nøkur byrða

Hvat við øllum teimum, sum eru útslitin og hava glett seg til at røkka 67 ára pensjónsaldur, men sum nú noyðast at bíða hálvt ár aftrat? Eitt hálvt ár kann verða bæði langt og drúgt hjá teimum, sum eru útslitin á arbeiðsmarknaðinum og ikki orka at arbeiða longur. Og gud náði tey, sum eru væl fyri heilsuliga og megna at arbeiða og vinna sær nakrar eyka krónur aftrat pensjónini. Tíma tey tað, tá TAKS kemur eftir teimum, so skjótt tey fara uppum kr. 61.900 mótrokningarmarkið? Neyvan. Tað gongur longu sjón fyri søgn.

Samstundis skríggjar samfelagið eftir arbeiðsmegi. Vit hava hana. Nógvir pensjónistar elska sítt arbeiði, men mótrokningin elvir ikki áhugan fyri hesum.

Tey eru ógvuliga fá, um yvir høvur nakar, ið vil arbeiða ókeypis fyri at fáa landsins fíggjarlóg til at hanga saman ár eftir ár við tí úrsliti, at viðkomandi liggur eftir á í eini sjúkrahússong og samstundis fær sum skoðsmál at liggja samfelagnum sum ein fíggjarlig byrða.
Tað hoyra vit av og á frá løgtingsins røðarapalli. Tað er svárt at hoyra.

## 70 ára aldursmark strikast

Á fundi hjá NSK, Nordisk Samarbetskomité, í Stockhólmi í mai, greiddu vit frá áheitan okkara á tveir teir størstu peningastovnarnar um at broyta eina reglu í lóg teirra og strika orðini um at gera mismun á nevndarlimum vegna aldur.
Í øðrum peningastovninum var reglan um 70 ára aldursmarkið longu strikað, men ikki í enska tekstinum. Tað varð rættað eftir áheitan Landsfelag Pensjónista.

Í hinum pengastovninum var 70 ára aldursmarkið strikað á eykaaðalfundi peningastovnsins í juni 2024. Eisini í hesum førinum var gjørt eftir áheitan Landsfelag Pensjónista.

Við hesum báðum dømum vóru hinir norðurlendsku nevndarlimirnir í NSK bilsnir yvir at hoyra, hvussu stutt armslongdin í Føroyum er millum vanlig fólk og føroyskar myndugleikar. Slíkt kenna tey ikki til í hinum grannalondunum. Har eru eisini framvegis peningastovnar og feløg, ið hava 70 ára aldursmark í sambandi við nevndir og nevndarval.

ANDAKT



# LIVANDI STEINAR

*Tekstur: Øssur Kjølbro, prestur*

**"Komið til hansara, hin livandi steinin, sum væl varð vrakaður av monnum, men er útvaldur og dýrmætur hjá Gudi, og latið tykkum sjálvar verða uppbygdar sum livandi steinar til eitt andligt hús, til ein heilagan prestaskap, til at frambera andlig offur væl toknað av Gudi fyri Jesus Krist" (1 Pæt 2,4-5).**

Tey kristnu í India trúgva, at ein av ápostlunum hjá Jesusi, Tummas, náddi heilt til India við gleðiboðskapinum og grundaði indisku kirkjuna. Tey siga eisini hesa halgisøguna:

Tummas endaði sum trælur hjá indiska konginum, Gondofares. Men av tí at Tummas var lærusveinur hjá einum timburmanni, fekk hann ein stóra peningaupphædd frá kongi, so at hann kundi byggja kongi eina glæsiliga borg.

Men Tummas gav ístaðin teimum fátæku allan peningin og brúkti heldur arbeiðsorkuna at boða gleðiboðskapin um Jesus Kristus. Tá ið hann so varð drigin til svars, svaraði hann kongi, at hann hevði bygt kongi eina borg - í himli.

Tað var tann borgin, Tummas bygdi: Menniskju, sum høvdu tikið við trúgv á Jesus; menniskju, sum høvdu møtt og merkt miskunnsemi í Jesu navni!

Henda halgisøgan minnir meg á tann sannleikan, sum Pætur ápostul skrivar um: At vit, ið trúgva á Jesus, eru livandi steinar í Guds andliga húsi. Pætur biður fyrst lesarar sínar koma til Jesus, sum er tann livandi steinurin, ið Gud valdi sær, hóast samtíðarmenninir í stóran mun vrakaðu hann.

Longu í Gamla testamenti verður tosað um tann vrakaða steinin, ið tó skuldi gerast hornasteinur í Guds templi (Sl 118,22). Eitt profetaorð, sum Jesus endurgevur fyri mótstøðumonnum sínum (Matt 21,42). Tí at Jesus er hornasteinurin í Guds livandi húsi, Guds kirkju, ið eru øll tey um allan heim, sum trúgva á Jesus. Hann er tann avgerandi byggisteinurin, sum ger kirkjuna til Guds kirkju. Hann er tann, sum



*Christianskirkjan í Klaksvík*

heldur øllum bygninginum saman, knýtir okkum saman, so ymisk vit annars eru!

Men tey, ið koma til Jesus, ger hann samstundis til livandi steinar í hesum sama Guds húsi. Har vit øll eru prestar, ið bera offur fram fyri Gud – ikki minst takksemi okkara og lovsang.

Mong okkara koma saman í húsum, sum eru bygd til at savna fólk um Jesu navn. Ofta eru kirkjur og samkomubygningar okkara vakrir bæði innan og uttan. Vit ganga høgt uppí at halda teir væl og eru errin av teimum. Júst tí at teir eru bygdir til Guds æru.

Men tann vakrasta kirkjan er tann, har ið teir livandi steinarnir taka sær av hvør øðrum – í kærleika. Har vit hava umsorgan fyri hvør øðrum, bera byrðar hjá hvør øðrum og stuðla, tá ið okkurt bagir. Har vit hava tol við hvør øðrum, umbera hvør annan og fyrigeva, tá ið onkur mistekur seg ella loypur framav.

Tummas ápostul bygdi kongi eina glæsiliga borg í himli. Tað kunnu vit eisini gera hvønn dag. Við at bera medmenniskjum okkara góð tíðindi um Jesus, og við at vera miskunnsom móti teimum, sum tørva okkara hjálp.

***Amen.***



***Dópskjóli frá 1921 hjá Frederik Joensen í Funningsfirði.***

*Mynd: Vibeke Ingvarsson*

# FRAMSÝNING AV DÓPSKJÓLUM

**Sunda Pensjónistafelag skipaði fyri framsýning av dópskjólum á Mentunardøgunum hjá Sunda Kommunu í 2024. Lýst varð við stuttari freist eftir dópskjólum. Á framsýningini vóru eini 35 dópskjólar og dópsklæði, umframt sjal og teppi, sum hava verið brúkt í sambandi við dóp. Heitt var á fólk um at skriva nøkur orð um kjólan, t.d. nær hann var frá og hvussu hann hevur verið brúktur. Fleiri áhugaverdar og persónligar søgur fylgdu við kjólunum. Nakrar av teimum verða lýstar niðanfyri.**

*Tekstur: Ingvard Fjallstein*
*Myndir: Ingvard Fjallstein, Vibeke Ingvarsson og Jørgin Joensen*

Dópsklæðini hingu uppi í Blákolluni á Oyri. Blákollan er tilhald hjá pensjónistum í Sunda kommunu.

Framsýningin var opin nakrar tímar um dagin í fýra dagar, og hon varð væl vitjað. Eini 250 fólk tilsamans stukku inn á gólvið hesar dagarnar.

## Elstu dópskjólarnir

Elsti dópskjólin var 111 ára gamal. Hans Andreas Dahl á Oyri varð doyptur í honum 7. august 1913 í Hvalvíkar kirkju. Absalon Joensen var prestur.

Jógvan og Ada Dahl á Oyri fingu átta børn. Inga Dahl var elst og fødd 16. november 1910. Hon hevur sagt frá, at mammubeiggi hennara, Óla



***Elsti kjólin frá 1913 í miðjuni og listi við nøvnum á øllum børnum, sum eru doypt í honum***

*Mynd: Ingvard Fjallstein*

Jákup Poulsen úr Hósvík, keypti klæði til dópskjólan. Hann sigldi sum skipari og hevði keypt blusutoy sum gávu til systrina Adu.

Tá í tíðini var ikki óvanligt, at jarðarmóðirin var í húsunum eina tíð, eftir at barnið var føtt. Inga Dahl sigur frá, at jarðarmóðirin, sum tók ímóti Hans Andreasi 23. juli 1913, æt Josefina og kom úr Kollafirði. Hon seymaði blusutoyið, sum Ada hevði fingið frá beiggja sínum, til dópskjóla, meðan hon var á Oyri.

Árini frá 1913 til 1945 vórðu 46 børn úr fleiri familjum doypt í kjólanum. Lena og Hans Andreas Dahl fluttu út á Toftir at búgva eftir kríggið. Eftir hetta eru tað mest eftirkomarar hjá teimum og systrum hennara, sum eru doypt í kjólanum.

Tilsamans 88 børn eru doypt í sama kjóla og í allar flestu førum vórðu bæði dópsdagur, kirkja og prestur upplýst.

Næstelsti dópskjólin á framsýningini var frá 1921. Hann var seymaður til dópin hjá Frederik Joensen í Funningsfirði. Katrina í Lamba var arbeiðskona hjá foreldrunum hjá honum, Marius og Annu Mariu í Funningsfirði. Hon seymaði dópskjólan. Kjólin hevur verið brúktur í ymsum familjum síðani tá.

## Elsta núlivandi barnið

Í dag er elsta barnið, sum var doypt í einum av kjólunum á framsýningini, Hanna Hansen av Langasandi.

Hanna var næstelsta barnið hjá Petur og Jonu Højsted á Langasandi, og fødd 28. juni 1932. Dópskjólin varð bestiltur úr París. Hanna er fyrsta barnið, sum er doypt í honum. Hon varð borin til dópin tann 24. oktober 1932 í Norð-skála kirkju. Jákup Dahl vígdi kirkjuna við Norð-skála 10. januar 1932, so nógv børn hava ikki verið doypt í kirkjuni frammanundan henni.



***Hanna Hansen (92 ár) av Langasandi við dópskjólanum frá 1932, hon var doypt í.***

*Mynd: Ingvard Fjallstein*



***Dópskjólin í miðjuni gjørdur burtur úr brúðarkjóla hjá Onnu Katrin.***

*Mynd: Ingvard Fjallstein*

Fleiri av eftirkomarunum hjá Hannu eru síðani doyptir í honum. Tann seinasti er oldurommudóttir hennara Maibritt Diana Dánialsdóttir, sum varð borin til dópin 28. apríl 2024 í Haldórsvíkar kirkju.

## Brúðarkjólin hjá Onnu Katrin

Sámal Hansen av Norðskála og Anna Katrin Ellingsgaard av Eiði giftust 17. juli 1974 í Havnar kirkju. Anna Katrin doyði januar 1980. Sámal og Anna Katrin fingu eingi børn. Sámal giftist aftur við Katrinu Hansen av Glyvrum. Til dópin hjá elsta syni teirra, Svenn, hevði omman, Maria Hansen við Norðskála, seymað brúðarkjólan hjá Onnu Katrin til dópskjóla. Yngru synirnir hjá teimum eru eisini doyptir í sama kjóla.

Sámal Hansen andaðist 19. septembur 2023. Svenn Hansen og Marianne Solvoll Landa fingu ein son í summar. Hann eitur Sámal Hansen Landa og varð borin til dópin í sama kjóla 1. august 2024.

## Skapandi mamma og omma

Tá Jørgin hjá Jórun og Sverra Joensen við Norðskála varð borin til dópin í januar 1974, var hann í hvítum dópskjóla við bláum bandi, sum mamman hevði seymað til hansara. Tá elsti sonur Jørgin og Annelis Joensen fór til dópin í 1999, var hann eisini doyptur í hesum kjóla, men nú hevði omman gjørt sokkar, skógvar og kepp til dópskjólan.

Tá miðlingasonurin hjá Jørgin og Annelis fór til dópin, hevði Jórun seymað drakt til dópskjólan. Draktin hevði kongabláar buksur og vest við hvítum ermum. Framman varð vesturin prýddur við silkimynstri. Henda draktin varð brúkt heima á dópsdegnum. Og tá yngsti sonur teirra fór til dópin, hevði omman seymað lítið fyriklæði til dópsdraktina og gjørt eitt kuffert klætt við bláum floyali til øll dópsklæðini.

Tá Maiken, dóttir Jórun og Sverra Joensen, giftist við Jákup Øre í 1999, seymaði Jórun brúðarkjóla til dóttrina. Tá Maiken og Jákup átta ár seinni ættleiddu ein um eitt ára gamlan drong, seymaði Jórun brúðarkjólan hjá dóttrini um til eina hvíta dópsdrakt; skjúrta, buksur og pyntaður vestur. Umleið trý ár seinni tóku tey



***Dópskjóli og heimadrakt á dópsdegnum til høgru og dópsdrakt til vinstru. Jórun Joensen hevur seymað.***

*Mynd Ingvard Fjallstein*

ein um eitt ára gamlan drong til sín afturat, og hann er eisini doyptur í somu dópsdrakt.

# Dópsins tekin

## Dópskjólin

Nógv børn verða doypt í siðbundnum dópskjóla. Hvíti doypskjólin verður tikin í brúk í Danmark seinast í 1700 talinum. Hvítt er hátíðarlitur kirkjunnar, og hvíti kjólin er eins og konfirmatións- og brúðarkjólin eitt tekin uppá, at tann, sum er í honum, er signaður, elskaður og fyrigivin av Guði.

Dópskjólin er alt ov langur til barnið. Tað ímyndar, at barnið kann vaksa í sínum dópi, og at lyftið um dópin er galdandi alt lívið.

## Krossmerkið

Í dópinum verður krossur ristur fyri andlit og bróst á barninum; fyri kenslum og viti. Barnið og lív barnsins er signað við krossmerkinum. Barnið verður Guðs barn. Krossurin er eisini kristindómsins ímynd av, at lívið vann á deyðanum.

Í dópinum er krossurin tí eitt tekin um, at tann doypti skal rísa upp til ævigt lív eftir deyða sín.

## Vatn ímyndar føðing, lív, reinleika

Dópurin verður nevndur endurføðing. Barnið er føtt sum barn hjá foreldrum sínum og teirra felagsskapi. Í dópinum verður barnið endurføtt sum Guðs barn og sett inn í felagsskapin hjá øllum kristnum.

Dópsvatnið vaskar syndina burtur, og barnið fær fyrigeving syndanna. Vatnið er eitt tekin um, at tann doypti verður reinur, og at einki ilt



***Sonur Jørgin Joensen í heimadrakt á dópsdegnum, Jórun Joensen hevur seymað.***

*Mynd: Jørgin Joensen*

skal skilja tað frá Guði. Talvan kann altíð vaskast rein aftur. Vatn gevur lív og er ein mynd av, at Guð gevur okkum lív. Vatn kann samstundis hótta lívið og minnir okkum eisini á deyðan, sum Guð skal frelsa okkum ígjøgnum fyri at geva okkum ævigt lív.

## Hendur

Kærleiksfullar hendur bera barnið til dópin. Prestur leggur hondina á høvdið á barninum, tá tað verður signað, sum tekin um, at Guð sjálvur signar. Tað, sum ein doyptur ikki sjálvur megnar at bera, kann hann leggja í Guðs hendur.

Barnið er signað við orðunum: Harrin varðveiti útgang tín og inngang tín hiðan ífrá og um allar ævir. Hetta merkir, at Guð fer at halda hond sína yvir menniskjanum, og at Guðs hendur skulu leiða barnið gjøgnum lívið - og einaferð leiða tað út úr lívinum og inn í tað æviga lívið.

Dópsins tekin er leysliga týtt úr donskum frá www.folkekirken.dk/livets-begivenheder/daab/hvad-betyder-daaben/daabens-symboler

***Sunda Pensjonistafelag***
***Ingvard Fjallstein***

# Smakkurin av Gran Canaria



*Við svimjihylin á hotellinum.*

**Suðuroyingur heitti skemtiliga á bleiku landsmenn og -kvinnur sínar um javnan at minnast til at venda "steikini" undir tí sterku sólini**



*Tekstur: Jóan Pauli Joensen*
*Myndir: Gunnleyg Durhuus*

Í dag  er tað meira ómakaleyst at ferðast til Spania og Gran Canaria, enn tað var at ferðast til Suðuroynna, tá eg var smádrongur. Serliga eftir, at Atlantsflog fór at flúgva beinleiðis úr Vágum til ferðamál sunnanfyri. Uppaftur ómakaleysari  er at ferðast við Sólorku, sum tekur sær so væl av gestum sínum, at næstan einki er at hugsa um.

Í februar í ár var eg við Sólorku í Gran Canaria fyri at fáa hita í mín aldrandi kropp á hávetursdegi. Kuffertið er borið útum. Í vindjakka og troyggju innanfyri og píkum undir skónum, standi eg uttanfyri í túninum og bíði eftir flogrutuni. Kavin liggur tjúkkur oman á glerinum, og tað er kalt, men ikki sama rusk-veðri, sum dagin frammanundan. Tá bilurin kemur, tekur sjaførurin kuffertið hjá mær og ber tað niðan í bilin, har eitt par umleið á mínum aldri longu situr. Tey skulu eisini til Gran Canaria, fái eg at vita.

Komin vestur á flogvøllin tók eg av mær píkar-nar, tí tað var mestsum tátt á flogvøllinum. Tað tók út ímóti 5 tímum at koma fram til Gran

***Hugni á altanuni á hotellinum. Jóan Pauli Joensen, Karmal Olsen og Astri Luihn.***



Canaria. Rættiliga long tíð at sita skoraður fastur hjá manni við longum beinum. Mynstrið í netinum í stólarygginum frammanfyri sást sjónskt á knøunum.

Á Gran Canaria tóku tey bæði frá Sólorku, Unn og Tróndur Djurhuus, sær av okkum frá tí løtu, vit komu úr tollinum. Uttanfyri høvdu tey bussar standandi at koyra okkum hagar, vit skuldu. Hetta var mín fyrsta ferð til Gran Canaria yvirhøvur, so eg var púra ókendur, meðan onnur í bussinum tosaðu staðkend um Playa del Inglés, hagar vit skuldu, og um hotellini Miraflor og Sandy Beach. Miraflor var altíð útselt beinanvegin, segði ein kona mær, men Sandy Beach, har eg skuldi búgva, var eisini gott. Tað var eitt nógv størri hotell og bert 5 minuttir frá strondini, fekk eg at vita. Komin hagar, fingu vit fyrst av øllum ein nátturðabita, áðrenn vit fóru upp á rúmini við lyklakortinum í hondini, sum skuldi vísa seg at vera dýrabart. Tíðin á Gran Canaria er tann sama sum í Føroyum, tað var songartíð, so eg legði meg og svav sum ein kópur í eini góðari song í kamari við svala og vaknaði tíðliga.



## Mest sum ættleiddur

Eg ferðaðist einsamallur, men var so heppin at verða mestsum ættleiddur av nøkrum fittum fólkum, sum straks tóku meg til sín so, at vit frá fyrsta morgni komu at sita um eitt stórt runt borð inni í matstovuni. Tað kom at vera okkara borð, har vit hildu hoff restina av tíðini, og

***Útferð til Playa Meloneras. Jóan Pauli Joensen og Karmal Olsen.***



*Á gongutúrum møtir ein m.a. standmyndum fram við strondini.*

hjálptu tey mær eisini at finna liggistólin við at leggja klæðir á hann, áðrenn onnur komu. Eg hevði okkurt at læra.

Tá eg var við Sólorku í Albir í Spania, tóku Sólorkufólkini sær av okkum frá morgni til myrkurs við útferðum, fimleiki um dagin, fyrilestrum seinnapartin og dansi og tónleiki um kvøldið. Hesar ferðirnar, bæði um várið og um heystið, eru so populerar, at fólk tekna seg til næstu ferðina longu, áðrenn tey fara heim aftur,  og summi tekna seg ár fram í tíðina, so her  her næstan ikki pláss fyri nýggjum ferðandi. Summi hava verið har einar 12 ferðir. Her í Playa del Inglés var øðrvísi. Her skuldu vit klára okkum sjálvi, men tey bæði, Unn og Tróndur, sveimaðu yvir øllum, og tað bar til at fáa fatur á teimum allan sólarringin, um tað skuldi komið at verið neyðugt. Tey skipaðu fyri tveimum hugnaligum Sólorkuløtum á Sandy Beach og fyri trimum útferðum við bussi. Á sólorkuløtunum var sett fram avbera gott krás frá Gran Canaria og  sponsk sjampanja, og so var tónleikur. Tað var so nógv at velja í, at  ein fyrrverandi kendur politikari kom í svára neyð av hesum. Hann visti ikki síni livandi ráð og bað konuna hjálpa sær: "Góða søta, kera, je veit ikki, hvat je dámi av øllum hesum. Kanst tú koyra mær okkurt upp á tallerkin, sum je dámi."Konan, eitt skilafólk, risti á høvdinum: "Nei, álvaratos, hvussu skal tað vera, tá teir, sum stýra landinum, ikki vita so frægt sum, hvat teimum dáma". So koyrdi hon honum upp á tallerkin, spanska skinku, smáar pylsur, fitikókaðar rækjur, olivinber, ostabitar og mangt annað, men sjampanjuna, hana fann hann beinanvegin sjálvur, har nýttist honum ikki hjálp.

## Elti ein bindiklubba

Hvønn dag skein sólin oman og niðan, ikki ein



*Hotellið Sea Side Sandy Beach um kvøldið.*




***Útferð til San Bartolomé de Tirajana. Óluva Klein, Laila Dam Frandsen og Bergliot Ihlen.***

regndropi, tó kundi sanddust frá oyðumørkini Sahara onkuntíð káma eitt vet fyri sólini, og tá fekk tú sandsmakk í munnin. Har gingu vit í stuttum buksum og T-shirts og bleikum knøum. Konufólkini vóru eitt sindur smartari enn mannfólkini. Onkrar eldri damur komu í blomstrutum summarkjólum við berum beinum í sandalum ella sneakers og berum ørmum. Tey, sum vóru heimavand á hotellinum, fóru fundvís oman í matstovuna fyrsta morgun at fáa sær morgunmat. Eg fekk eyga á ein bindiklubb í Havn, sum hevði lovað monnunum við. Tey elti eg fyri ikki at villast á leiðini til matstovuna.

Tað var so smart á hesum hotellinum, at tær nýttist hvørki pening ella gjaldskort. Tað var nóg mikið við lyklakortinum, sum eisini kundi nýtast at gjalda við.. Tænararnir og tey í barrini høvdu lítlar paddar, sum tey tastaðu tað, tú hevði keypt og kostnaðin inn á, løgdu lyklakortið á paddin, og so krutlaði tú við



***Vit gingu nógvar hugnaligar túrar niðri við strondina í Playa Del Ingles.***



*Útsýnið frá altanuni á hotellinum, Sea Side Sandy Beach, Playa del Ingles.*

fremsta fingri eina undirskrift niður á paddin, so var leyst og liðugt. Soleiðis fyribils sorgleys, kundu fólk keypa alt tað, tey vildu og gjalda í móttøkuni, tá gjørt var upp fráfaringardagin..

Tey, sum eisini høvdu verið í Albir við Sólorku, hildu yvirhøvur, at maturin var so nógv betri á Sandy Beach enn á Albir Garden í Albir. Maturin á Sandy Beach var sera góður hesar dagarnar, har einstøk lond løgdu navn til ávísan mat hvønn dag, umframt alt tað, sum hotellið annars hevði at bjóða. Hinvegin dámdu teimum flestu betri umhvørvið rundan um hotellið, tað var í so trongt rundan um poolin, og fólk lógu ógviliga tøtt saman, men tað tyktist ikki at bila.

Tað var skjótt, at teir bleiku føroysku kropparnir fingu døkkari lit. Tað sá ein suðuroyingur eisini, og bað hann fólk inniliga um at "venda steikini" javnan. Fólk fóru javnan í hylin at svala á sær, men summi teirra vóru ofta skjót uppaftur, tí tey høvdu gloymt at taka hoyritólið úr oyrunum. So funnu tey onkran, sum tey kendu, at taka sær av tí, og so sprungu tey útí aftur. Soleiðis fóru hesir heitu dagarnir frammi við poolinum, har tað eisini var barr beint við, har tað bar til at sløkkja tostan við lyklakortinum.

## Standmyndin av Líggjas

Á einum fjalli hevði maður einaferð í 1930-árunum funnið uppá at høgga sær eitt helli inn í



***At hugna sær á sólstólunum saman við góðum fólki, er ein týdningarmikil táttur á ferðini.***

fjallið. Grótið er basalt, júst sum í Føroyum, men nógv bleytari, so tað ber til at høgga í tað við eyrhakkara og krákunevni, segði Tróndur Djurhuus við okkum á útferð hagar.

Í dag var ein rúgva av slíkum hellum í hesum fjalli, summi vóru frítíðarbústaðir, onnur sølubúðir og matstovur. Hellini vóru dýr at keypa. Vit fingu kanin at eta á matstovu í einum helli og kaffi og kaku omaná. Fleiri óttaðust at eta kanin, meðan onnur ótu við góðum matarlysti..

Tá eg spurdi fróðarmannin, Hans Holm, sum var við á hesi útferð, hvussu tað bar til, at hetta grótið, sum  varð vorðið til á sama hátt sum føroyskt grót, var so bleytt, var svarið, at tað helst kom av, hvussu skjótt basaltið var kólnað í tí, og um hann hevði kunnað givið mær greitt svar uppá, hví tað var so, so hevði hann havt fingið Nobelprísin fyri langari tíð síðan.

Ein útferðin var til Puerto Mogan, sum er ein staður, ið er beinleiðis bygdur til turistar av einum norðmanni – ein kulissa við kanalum og hugnaligum havnarlag og strond. Her vóru vit á matstovu, sum fiskimannafelagið í Mogan átti, óivað ein góð inntøkukelda.



*Rommbrennarí, har m.a. rommsmakking var á skránni*




*Vitjan í sera hugnaliga býnum Mogán.*

Ein onnur attraktión í Mogan var Líggjas, sum Tróndur Djurhuus nevndi hann. Ein vanligur, men sera fittur maður, sum eftir deyða sín hevði fingið gjørda standmynd av sær, har hann sat á einum beinki, so turistarnir kundu lata seg avmynda saman við honum.

Ein dagin fingu vit rundan um tað runda borðið tilboð um at koma við í eini ferð kring alla oynna, sum okkurt norskt felag skipaði fyri. Uppi í ferðina hoyrdi, at vit skuldu hoyra um seingjarklæði úr ull ella við ull í, saman við einum drekkamunni. Ein kona, sum tosaði norskt, segði at hon nú hevði sagt søguna um hesi frálíku seingjarklæðini í 40 ár, sum hon lovprísaði upp til skýggja, og tað bar snøgt sagt ikki til at sova betri, enn í hesum seingjarklæðunum, men trey kostaðu saman við songini sum ein ferð til Gran Canaria. Eg læt meg ikki freista, um onnur í ferðalagnum gjørdu tað, veit eg ikki. Vit sluppu tíbetur burturúr hesum søluátakinum.

## Koyridramatikkur

Tað var rætt, sum Tróndur Djurhuus hevði sagt, tá vit koyrdu frá flogvøllinum, at henda runda oyggin norðan fyri var eitt vet vátari og tí grønari, og her var tað, at flest fólk búðu, tí her var ikki so oyðumarkarkent, sum sunnanfyri, har turistarnir fingu sólina. Men vegirnir, teir vóru smalir og krókutir millum fjøllini.

Tað vildi til, at vit møttu einum bili við trailara. Har, okkara yvirvaksni bussur og trailarin møttust, var bergveggur til aðra síðuna og snipst niður fyri til hina. Sjaførarnir báðir hugdu upp á hvønn annan eina løtu. So bakkaði okkara sjaførur bussin so langt út á tromina, sum tað bar til. Bert



***Altíð okkurt gott omaná døgurðan.***

helmingurin av dekkunum aftanfyri stóðu á vegnum, segði eitt eygnavitni umborð. Øll hildu ondini, meðan ein skipari hjá Strandferðsluni, sum var við, og sum hevði siglt í øllum veðri, signaði seg og legði saman hendur. Bilurin við trailaranum kvinkaði seg so fram um bussin tumma fyri tumma, og tað var ikki meira enn tveir tummar millum bilarnar, har tað var minst. Tíbetur bar trailarin ikki við bussin, men tað grenjaði, tá hann bar við bergið.

Tað var ein lætti hjá okkum at síggja í reyvina á trailaranum og merkja at okkara sjaførur fekk larrað bussin innaftur á ta meira tryggu koyribreytina. Her mugu tunlar verða minst líka tiltrongdir sum til Dals á Sandoynni, og um stutta tíð verða fleiri eisini tiknir í nýtslu. Restin av ferðini gekk sum eitt spæl.

Kanska var eg vorðin meira skelkaður, enn eg grunaði, tí eg fór ikki við á ferðini næsta dag. Ein ferð, sum hevði fingið heitið "Smakkurin av Gran Canaria."

Flestu teirra, sum komu aftur av hesi ferðini, vóru sera væl til passar, tá tey komu aftur. Tey høvdu m.a. vitjað eitt distillarí, har tey framleiddu romm og sluppu at smakka tað, tey vildu. Ein sera væl nøgd dama úr Eysturoynni lyfti annan armin upp og peikaði við fremsta fingri upp í loft og tók nøkur dansitrin á veg úr bussinum. Einki at ivast í, at smakkurin av Gran Canaria hevði verið góður. Eg eigi ferðina næstu ferð til góðar, tá eg fari til Gran Canaria.

## Ungir lummatjóvar

Henda ferðin var heldur ikki uttan dramatikk, fekk eg at vita, tí ein í ferðalagnum mundi fingið stolið seðlamappuna í einum tronga, har tað vóru nógv fólk. Men her høvdu lummatjóvarnir valt skeivan mann, ein fyrrverandi politist og sýslumann. Sum eitt skot fór hesin fyrrverandi politisturin, sum júst ikki kundi sigast at vera diddarak, at snurra sum ein snurritoppur, og hann treiv í ryggin á eini gentu og í bringuna á einum drongi um somu leið og helt báðum føstum. Gentuni slepti hann tó skjótt, men ikki manninum, sum hevði tasku. Við leysu hondini tók hann niður í taskuna og fekk fatur á mappuni, sum lá ovast. Tá hon var bjargað, risti hann dreingin so, at tenninar glintaðu í skallanum á honum, áðrenn hann slapp honum.

Hesir lummatjóvar hava óivað fingið ein slíkan skelk, at teimum hava tørvað sálarliga kreppuhjálp, men um slík er tøk fyri lummatjóvar, veit eg ikki. Politisturin fortaldi mær aftaná, at hann altíð legði mappuna tvøra niður í reyvarlumman, tí tá var hon ring at fáa upp, og tí merkti hann straks, at onkur royndi at taka hana. So vita tit tað.

Ferðin til Gran Canaria var ein frálík ferð við sól og hita hvønn einasta dag, so øll vóru væl dæmd umborð á flogfarinum heim aftur til Føroyar. Kanska skuldi mann fari aftur næsta ár.

ÁRSVEITSLAN HJÁ LANDSFELAG PENSJÓNISTA 2024

# Ein hugnalig løta í Dansifrøi



*Fólk hugna sær á ársveitsluni hjá Landsfelag Pensjónista í januar.*

*Tekstur: Gunnleyg Durhuus*

*Myndir: Tindra v. Rani Joensen*

Leygarkvøldið 20. januar 2024 var ársveitslan hjá Landsfelag Pensjónista hildin í Dansifrøi í Tórshavn. Tiltakið savnaði limir úr eldra- og pensjónistafeløgum kring landið til ein dag við góðum mati, undirhaldi, gestarøðu og dansi. Veitslan var eitt væleydnað tiltak, har felagsskapur, tónleikur og gleði vóru í hásæti.

## Ein fjølbroytt og hugnalig skrá

Veitslan byrjaði kl. 17.00, har limirnir settu seg til borðs í góðum lag. Borðhaldið var eyðmerkt av tónleiki frá Ólavi Højgaard, Holgari Jacobsen og Jógvani Olsen, sum skaptu eitt hugnaligt og livandi umhvørvi við sínum ljóðføri og sangi. Gestirnir fingu møguleika at njóta ein góðan døgurða, meðan tónleikarnir spældu undir til sangirnar.



*Tommy Petersen, gestarøðari.*



*Alfred Olsen, formaður í Eldrafelagnum á Toftum.*



*Hugnaligt prát tvørturum borðini.*



*Elisabeth Thorsteinsson, Tórshavn.*



*Ragnar Hentze, Argir.*



*Lagið var sera gott undir borðhaldinum.*



*Hjúnini Jákup og Elisabeth Hummeland, Vestmanna, vunnu gávukortið frá Atlantic Airways.*



*Hjúnini Anna Soffía og Hilbert Durhuus, Tórshavn, vunnu gávukortið frá Smyril Line*




*Tónleikabólkur við Jógvan Olsen, Holgar Jacobsen og Ólavur Højgaard.*

## Gestarøða

Eftir døgurðan var skráin ríkað við eini gestarøðu, sum var væl móttikin av teimum, ið møttu. Gestarøðarin, Tommy Petersen, greiddi frá viðurskiftunum í Nepal, har hann hevur starvast í nøkur ár. Undir borðhaldinum vóru tað fleiri, ið tóku orðið.

## Lutaseðlasøla og vinningar

Lutaseðlasøla var við nógvum góðum vinningum. Millum høvuðsvinningarnar vóru gávubræv frá Smyril Line og Atlantic Airways, sum skaptu stóran spenning millum luttakararnar. Tey, ið høvdu hepni við lutaseðlunum, fóru heim við góðum vinningum, men øll fóru heim við einum ríkum minni frá eini góðari veitslu.

## Dansur

Tónleikararnir hildu fram við tónleiki til dans, har gestirnir høvdu høvi at fáa sær ein góðan „svingom„ og annars hugnaðu sær við práti í stóra dansihølinum.

## Eitt væleydnað tiltak

Ársveitslan hjá Landsfelag Pensjónista 2024 var ein góð uppliving fyri limirnar í pensjónistafeløgunum í formi av felagsskapi, góðum mati og tónleiki. Tiltakið gjørdi tað møguligt hjá pensjónistum at samlast, møta kenningum og skapa góðar løtur saman. Veitslan var eitt gott dømi um, hvussu tiltøk sum hesi eru við til at skapa samanhald og gleði millum tey eldru í samfelagnum, og ársveitslan er ein fastur táttur, ið tey eldru gleða seg til á hvørjum ári.



*Tónleikararnir Holgar Jacobsen, Ólavur Højgaard og Jógvan Olsen saman við Alfred Olsen, nevndarlimi í Landsfelag Pensjónista.*



*Tað stóð ikki á, tá pensjónistarnir fingu sær ein "svingom".*



*Formaðurin í Eldrafelagnum á Toftum, Alfred Olsen, tók ímóti gestunum.*

## Eldradagurin 2024 á Toftum:

# EIN HEILT SERSKILDUR DAGUR FYRI PENSJÓNISTAR

*Tekstur: Gunnleyg Durhuus*
*Myndir: Iris Gerðisá*

Leygardagin 14. september 2024 var ein serligur dagur fyri pensjónistar tá ‚»Eldradagurin 2024» varð hildin í Høllini í Tofta skúla. Dagurin, ið er fyri allar pensjónistar, hevði eina fjølbroytta skrá við góðum undirhaldi, spennandi gestarøðarum og hugnaligum felagssangi.

Dagurin var fingin í lag í tøttum samstarvi millum Eldrafelagið á Toftum, Eldrafelagið Nón og Landsfelag Pensjónista. Eitt tílíkt tiltak er ein gyltur møguleiki at njóta ein góðan dag saman við vinum og kenningum.

### Felagsskapur og góður matur

Eldradagurin byrjaði kl. 12, tá gestirnir komu og høvdu møguleika at keypa lutaseðlar.



*Um 400 pensjónistar rúmaðust væl í høllini í Tofta skúla.*



*Meðan bíðað verður eftir dessertini.*



*Johild Joensen, forkvinna í Eldrafelagnum Nón, bjóðar vælkomin*



*Borgarstjórin í Nes kommunu, Súni í Hjøllum.*



*Fleiri málningar vóru sum lutaseðlavinningar, m.a. hesir hjá Jákup Petur Gaardlykke.*

*Hjúnini Dánjal Petur og Jana Nielsen.*



Johild Joensen, forkvinna í Eldrafelagnum Nón, bjóðaði vælkomin, og aftaná varð borðreitt við góðum døgurða, lambakjøti og rabarbugreyti omaná.

Húsorkestrini á Toftum og Runavík spældu undir til sangirnar, so stemningurin var góður allan dagin.

## Gestarøður, felagssangur og skemt

Borðstjórin Sámal Petur í Grund syrgdi fyri, at alt gekk væl. Gjøgnum allan dagin var skemt á skránni inn ímillum, har bæði Sámal Petur og Fríðhild Winther søgdu frá skemtisøgum. Borgarstjórarnir báðir, Torbjørn Jacobsen, Runavíkar Kommuna, og Suni í Hjøllum, Nes Kommuna, bóru fram áhugaverdar heilsanir, har bæði álvari og skemt var við.

## Prát um kroppin, at gerast eldri og fysiskur aktivitetur

Fysioterapeuturin Jákup Petur Eliassen, hevði áhugaverdan fyrilestur við yvirskriftini: "Prát



*Húsaorkestrini á Toftum og úr Runavík spældu undir til sangirnar.*



*Borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Torbjørn Jacobsen.*



*Borðfimleikur.*



*Nógv var at flenna at.*



*Forkvinnan í Landsfelag Pensjónista, Beate L. Samuelsen, bar fram eina heilsan frá felagnum.*



*Fríðhild Winther var annar av borðstjórunum.*



*Alma Petersen, uttast vinstrumegin, hugnar sær saman við vinfólki.*



***Hjúnini Ingeborg og Andru Vinther saman við øðrum gestum.***



***Sámal Petur í Grund var eisini borðstjóri.***

um kroppin, at gerast eldri og fysiskur aktivitetur"

Hann hevur sjálvur nógvar royndir frá triatlon, renning og súkling, har hann hevur verið føroyameistari fleiri ferðir.

Uppá ein einfaldan hátt greiddi hann frá, hví tað er týdningarmikið hjá eldri at venja. M.a. segði hann:

- Fyrimunirnir við at røra seg, økjast sum man eldist. Pensiónstrygging fyri kroppin. "Koyr eitt sindur í nú, fá meiri aftur seinni".
- Best at verða virkin ígjøgnum alt lívið, men tað er ongantíð ov seint at byrja at venja.
- Venjingin kann verða einføld. Hugsa bara um at røra teg.
- Ger venjingar, so tú fær pulsin upp og ger styrkivenjingar.
- Mental venjing. Sosialt lív og hugur. Verð virkin í samfelagnum.

Hann vísti við myndum og grafum, hvat hendir við kroppinum, m.a. heilanum, tá ein venur.



***Sólfríða Lamhauge dregur lutaseðlar, meðan Sámal Petur í Grund kannar, um alt er í ordan.***



*Í gongini í Tofta skúla varð farið upp á gólv.*

Jákup Petur endaði fyrilesturin við at biðja fólk reisa seg, har hann so skipaði fyri fysiskum venjingum við borðini. Hetta var væl móttikið.

## Lutaseðlar við góðum vinningum

Meðan lutaseðlarnir vóru drignir fingu fólk kaffi og kaku. Lutaseðlavinningarnir vóru nógvir, m.a. frá Smyril Line, Atlantic Airways, nógv gávukort frá ymsum handlum og fyritøkum. Harafturat vóru nógvir góðir málningar, ið listafólk í Eysturoynni høvdu latið.

## Undirhald

Eftir kaffisteðgin var ætlanin at skipa fyri gongutúrum, men orsaka av vánaliga veðrinum, var hetta ikki gjørligt, so góð tíð bleiv til at hitta kenningar, felagssang, og Hervør á Torkilsheyggi við sangbólki framførdi.

## Upp á gólv

Áðrenn farið varð upp á gólv, varð borðreitt við breyði við føroyskum viðskera. Tann føroyski dansurin, ið Kristian Jacobsen skipaði fyri, gekk avbera væl.

Dagurin endaði við at Beate L. Samuelsen, forkvinna í Landsfelag Pensjónista, bar fram eina heilsan, og Alfred Olsen, formaður í Eldrafelagnum á Toftum, segði nøkur orð og takkaði fyri dagin.

Ein sera væleydnaður dagur.



***Fundur hjá pensjónistafeløgunum í Suðuroy. Ingeborg Vinther greiðir frá virkseminum hjá feløgunum.***

# VITJAN HJÁ PENSJÓNISTAFELØGUNUM Í SUÐUROY

***Tekstur: Beate L. Samuelsen***
***Myndir: Gunnleyg Durhuus***

Í heyst vitjaðu umboð fyri Landsfelag Pensjónista, Beate L. Samuelsen, forkvinna, Jákup Andreasen, nevndarlimur, og Gunnleyg Durhuus, skrivari, bæði pensjónistafeløgini í Suðuroynni, har feløgini høvdu skipað fyri felagsfundi í Vági.  Feløgini eru tvey í tali: Pensjónistafelagið Høft og Pensjónistafelagið í sunnaru helvt í Suðuroynni.

Við okkum høvdu vit Robert Vilhelmsen, varalim í Pensionistafelagnum í Havn, ið greiddi frá galdandi pensjónsskipan og nógv umrødda haldførinum hjá landinum, har veksandi talið av pensjónistum fáa skuldina fyri, at landsins haldføri versnar.

Greitt varð frá virkseminum hjá Landsfelag Pensjónista, har felagið javnan er hoyringspartnari hjá løgtinginum í lógarmálum. Eisini varð greitt frá uttanlanda samstarvi, har limalondini hava nógv felags áhugamál, og góð hugskot verða samskipað við áheitanum á landsins myndugleikar.

Eitt hugnaligt kvøld, har væl av fólki var komið saman..




***Robert Vilhelmsen greiðir frá um haldsførisavbjóðing.***



*Eftir framløgurnar sang Ólavur Højgaard nøkur løg.*

# VÁRDAGA-TILTAK Í SMS

***Tekstur: Beate L. Samuelsen***
***Myndir: Gunnleyg Durhuus***

Hósdagin 2. mai var Landsfelag Pensjónista boðið at standa fyri einum eldratiltaki á Torginum í SMS. Marknaðardeildin hjá SMS tók sær av kørmunum, og vit fingu sum uppgávu í ein tíma at fylla teir "positivt" út.

Við í panelinum vóru umframt forkvinnuna í Landsfelag Pensjónista, Ingeborg Vinther, næstforkvinna í LP og forkvinna í Pensjónistafelagnum í sunnaru helvt av Suðuroynni, Alfred Olsen, nevndarlimur í LP og formaður í Eldrafelagnum á Toftum, og Eirik Suni Danielsen, leiðari í Tilhaldinum í Tórshavn.

Í framløgunum varð greitt frá og víst á møguleikar og tilboð um, hvussu man kann gera lívið sum pensjónistur so gott og ríkt sum gjørligt. Tiltakið var væl vitjað av bæði eldri og yngri, og fólk fingu eisini eitt gott prát meðan tey fingu kaffi og lagkøku.



***Beate L. Samuelsen, Eirik Suni Danielsen, Ingeborg Vinther og Alfred Olsen.***

Eftir framløgurnar sang Ólavur Højgaard nøkur løg, Holgar Jacobsen og Niels Olsen spældu undir.

Tiltakið eydnaðist avbera væl, halda vit sjálvi.

# PENSJÓNISTAFELAGIÐ HUGNI



*Pensjónistafelagið Hugni í Klaksvík.*



***Tekstur og myndir:***
***Maria Olsen, forkvinna***

Hugni er felag fyri allar pensjónistar í Klaksvík. Felagið varð stovnað í 1972 og hevur hildið til ymsa staðni í Klaksvík, millum annað í Gamla skúla í húsunum, har Skótaliðið Nólsoyar Páls og í KFUM og -K húsast.

Felagið hevur síðani 2018 hildið til í Smæruni, sum er í niðastu hædd av Sambýlinum á Heygnum.

Forkvinna í felagnum tey seinastu 11 árini hevur verið Ninni Olsen. Saman við henni hava tey seinastu árini sitið Sigga Leivsgarð, sála, Marjun Joensen, Jetta Ellingsgaard og Marna í Giljum. Í januar í 2024 andaðist Sigga Leivsgarð brádliga, og skerdi hetta arbeiði í nevndini nakað.

## Nýggj nevnd

Á aðalfundi, sum varð hildin tann 10.09.24, boðaði Ninni Olsen frá, at hon ynskti at gevast sum forkvinna. Á hesum fundi varð nýggj nevnd vald. Nevndin skipaði seg beint eftir aðalfundin soleiðis, at nú er Maria Olsen, forkvinna, Hilda Viderø, næstforkvinna, Kristina Lútzen er nevndarlimur og skrivari, Jetta Ellingsgaard er nevndarlimur og Marna í Giljum er nevndarlimur. Eykalimir eru Steinbjørn Jacobsen og Ásla Rasmussen.

Nýggja nevndin hevur gjørt av at halda fram eftir sama leisti, sum Hugni hevur arbeitt eftir í mong ár.



***Nýggja nevndin í Hugna. Frá vinstru: Jetta Ellingsgaard, nevndarlimur, Marna í Giljum, nevndarlimur, Kristina Lützen, skrivari, Maria Olsen, forkvinna, Hilda Viderø, næstforkvinna.***



***Maria Olsen, forkvinna í Hugna, saman við Ninni Olsen, fyrrverandi forkvinnu.***

Við á aðalfundinum vóru Beate L. Samuelsen, forkvinna í LP, og skrivarin Gunnleyg Durhuus, ið greiddu frá dagliga virkseminum hjá Landsfelagnum, m.a. um uttanlandssamstarvið, har felagið fær nógv góð hugskot.

Hugnaløta er í Smæruni hvønn týsdag frá kl.15.00 til 17.00. Á hesum fundum hevur nýggja nevndin sett sær fyri einaferð um mánaðin at bjóða fólki at greiða frá evnum, sum hava áhuga hjá pensjónistum.

Fyrsti fundur av hesum slag var týsdagin tann 15. oktober 2024. Har greiddi Marna E. Jensen, leiðari í NBH (Norðoya Bú-og Heimatænastu) frá um teirra virksemi.

Gerda Absalonsen og Margretha í Buð greiddu frá um Eldraráðið í Norðoyggjum.

Jógvan Mortensen skipaði fyri sangi og tónleiki.

Annar fundur av hesum slag var týsdagin 29. oktober, har fólk, ið stilla upp til býráðsvalið 2024, søgdu frá, hvussu tey ætla sær at arbeiða fyri teimum gomlu í kommununi tey komandi fýra árini.

## Hugni meiri sjónligt

Nevndin ætlar at gera Hugna meiri sjónligt t.d. á sosialu miðlunum, soleiðis at fólk vita, hvat fyriferst í felagnum og sjálvi kunnu koma við góðum hugskotum.

Jólaveitslan verður hildin týsdagin 26. november 2024.

Allir pensjónistar í Norðoyggjum eru vælkomnir at tekna seg sum lim. Limagjaldið er 150,- kr. um árið.

Hugni ynskir øllum eini gleðilig jól og gott nýggjár.

# KØKUUPPSKRIFTIR

*Tekstur: Ingeborg Vinther*



## Rabarbukøka

- Sker 400 gr. av rabarbum, blanda rabarbur smátt við 1 dl. rørsukur, 2 tsk. vaniljusukur,
- 1 spsk. eplamjøl.
- Blanda saman og koyr í eitt eldfast fat.
- Smelta 100 gr. smør og lat tað kølna, rør smeltaða smørið við 200 gr. av rørsukuri.
- Rør 1 egg í deiggið, 150 gr. av fínamjøli og 1 tsk. av bakipulvuri.
- Koyr so deiggið omanyvir rabarburnar.
- Til  seinast, koyr nøtur ella smátskornar mandlur útyvir køkuna.
- Baka niðast í ovninum á 180 gradir í 45 min.
- Hóskar væl við pískaðum róma ella blanda róma við súrróma.

## Plumkøka uttan sukur, vælegnað til fólk við diabetes

- 150 gr. turkaðar abrikosur
- 1 stórt súrepli
- 150 gr. smør
- 4 tsk. flótandi sødin
- 4 egg
- 200 gr. fínamjøl og 3 tsk. bakipulvur.
- Sker abrikosurnar smátt, flís súrepli og sker tað smátt.
- Rør smør og sødin væl við einum hondmiksara.
- Koyr so egg í, eitt í senn og rør væl millum hvørt egg.
- Koyr mjøl, bakipulvur, abrikosur og súrepli í deiggið.
- Stoyt deiggið í ein rundan form.
- Baka køkuna í 40-45. min. mitt í ovninum á 200 gradir.



# PENSJÓNISTAR SNÝTTIR FYRI PRÍSJAVNING AV SAMHALDSFASTA

**Í november 2024 mánaði sendi Landsfelag Pensjónista eitt skriv til stýrið fyri AMEG (Samhaldfasta), har vit finnast at lønarvøkstrinum, sum allir lønarbólkar hava fingið í mun til ógvisliga prísvøksturin, men at hetta tíverri ikki er galdandi fyri okkum pensjónistar. Somuleiðis varð sama skriv sent til politiska myndugleikan.**

***Tekstur: Beate L. Samuelsen***

Allir lønarbólkar hava fingið ein munandi lønarvøkstur í mun til ógvisliga prísvøksturin (inflatión), men hetta er ikki galdandi fyri pensjónistarnar.

Stýrið fyri AMEG (Samhaldsfasta) kunngjørdi í september í 2024, at mánaðargjaldið til pensjónistarnar hækkar við 130 kr. um mánaðin í 2025, tvs. úr kr. 6.325 til kr. 6.455 um mánaðin. Hækkingin skuldi av røttum verið útvið 3 ferðir størri tvs. kr. 328 pr. mánað fyri at samsvara við prísvøkstrinum í tíðarskeiðnum nov. 2021 til aug. 2024.

Í nov. 2021 var prístalið 125,8 sambært Hagstovuni, og í aug. 2024 var prístalið 143,3. Við grundarlag í prísvøkstrinum í hesum tíðarskeiðið, eigur mánaðarliga útgjaldið í 2025 at verða sett til kr. 6.783 pr. mánað, tvs. ein mánaðarlig hækking við kr. 328 og ikki einans kr. 130, sum stýrið hevur samtykt. Henda hækking umfatar bert eina prísstilling, og ein verulig hækking av útgjaldinum eigur eisini at koma afturat.
Enn einaferð má eisini minnast á, at grunnurin er ogn hjá løntakaranum og løntakarans inngjald er skattað við inngjald og verður aftur skattað við útgjald, tvs. ein fúl dupultskatting, og sum betrar um haldføri hjá bæði landi og kommunum, men ikki hjá pensjónistum.

Í 2024 verður metti skatturin av útgjaldinum frá Samhaldsfasta umleið 250 mill. kr., og í 2025 er hann mettur til umleið 277 mill. kr. og munar sostatt sera gott hjá landi og kommunum.

Heitt verður á stýrið fyri AMEG um, at endurskoða útgjaldið fyri 2025, soleiðis at tað í minsta lagi verður prísjavnað sambært prísvøksturin frá nov. 21 til aug. 24. Samstundis heitir Landsfelag Pensjónista á Landsstýrið um at avtaka dupultskattingina, tvs. skattafrítt inngjald til Samhaldsfasta ella skattafrítt útgjald úr Samhaldfasta.

# AVSLÁTTARAVTALUR HJÁ LANDSFELAG PENSJÓNISTA

NOVEMBER 2024

**Landsfelag Pensjónista hevur fingið nógvar góðar avsláttaravtalur við handlar, hotell, matstovur og aðrar fyritøkur.**

**Limirnir í teimum 16 lokalfeløgunum kring landið kunnu fáa avsláttur úr 5% upp í 50% av vørum og tænastum frá ymsum handlum, hotellum, matstøðum og øðrum fyritøkum kring landið.**

***Avslátturin er treytaður av, at limur vísir fram persónligt limakort frá Landsfelag Pensjónista.***

**Limirnir fáa limakort við at venda sær til sítt lokalfelag og nýggir limir við at tekna seg hjá lokalfelagnum.**

**Avsláttaravtalurnar liggja eisini úti á heimasíðuni www.eldri.fo.**

## Í Tórshavn

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Nice** | **15%** | Av barnaklæðum 0-16 ár | 270200 |
| **Hoyrnin** | **10%** | Av hoyritólum | 321731 |
| **Hennara**<br>Kvinnuklæðir | **10%** | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 274075 |
| **Tignir - væl klæddir menn**<br>Mannfólkaklæðir | **15%** | Av øllum vørum | 292900 |
| **Fótbúni**<br>Skósøla | **10%** | Av øllum vørum | 311705 |
| **Gunnvá**<br>Kvinnuklæðir | **15%** | Av øllum vørum | 214206 |
| **Toscana** | **10%** | Mán. til hósd. og sunnudag | 211109 |
| **Angus Steakhouse** | **10%** | Av øllum mati mánadagar | 717777 |
| **Hotel Hafnia** | **15%** | Frokostbuffet í matstovuni og av øllum á Kafé Kaspar | 313233 |
| **Hornið, SMS** | **10%** | Av øllum vørum | 233423 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Fljóðið sp/f** | **10%** | Av øllum vørum | 311718 |
| **Jógvan Weihe** | **10%** | Av øllum vørum | 353897 |
| **Hjá Kissa**<br>Mannfólkaklæðir | **15%** | | 311395 |
| **Bailine** | **10%** | | 280554 |
| **Tórshavnar Maskinhandil** | **15%** | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 313442 |
| **Hitapumpur.fo** | **10%** | Av hitapumpum við montering.<br>Um 3 keypa saman | 212204<br>312204 |
| **Køtlum** | **20%** | Hárviðgerð | 312299 |
| **Touché**<br>Mótahandil | **10%** | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 603300 |
| **Nordcar** | **10%** | Av dekkum og felgum | 363738 |
| **P/F Waag** | **10%** | Av dekkum | 313666 |
| **SRI**<br>Máling | **10%** | Av øllum uttan glasvevi | 313030 |
| **in•tone clinic** | | Viðgerð við infrareyðum hitateppi 100 kr. Vødda- og pínuviðgerð 120 kr. | 516114 |
| **Salong Liljan**<br>Torfinsgøta 6 | **15%** | Hárviðgerð, mán.-fríggj. áðrenn kl. 13 | 314768 |
| **Kaffihúsið**<br>Bryggjubakki 14 | **10%** | Av øllum mati | 358787 |
| **Havgrím Seaside Hotel**<br>Yviri við Strond 14 | **10%** | Av øllum mati og gistingum | 201400 |
| **Muna v/Høgna Waag** | **10%** | Bókin "Mín lívsleið". Ókeypis útkoyring | 767601 |
| **Valdemar Lützen**<br>Byggibúð & Lásatænasta & Rustfrí<br>Heilsøla, Skálatrøð 14 | **15%** | Av øllum vørum | 301020 |
| **Marjun Wolles** | **15%** | Stjørnuløtur - Kærleikin gloymir ei<br>Fløga og tekstur | 271664 |
| **Hotel Djurhuus**<br>Yviri við Strond 19 | **10%** | Av mati og gisting | 355500 |
| **Fló Tøknihjálp** | **30%** | Av allari tøkniligari hjálp<br>(telefonir, teldir og teldlar, v.m.) | 227375 |
| **Thomas Dam á Hálsi**<br>Heykavegur 3 | **10%** | Av øllum vørum | 311400 |
| **Mensendieck Online** | **25%** | Av mánaðarhaldinum til Mens. Online | 515755 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Petri Tannklinikk** | 10% | Av protesum og útvaldum tannviðgerðum, ið ikki fáa almennan stuðul | 320320 |
| **Frihedsbrevet.fo** | 50% | Av árshaldi | hey@frihedsbrevet.fo |

## Í Vágum

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Unicar** | 10% | Av øllum leigubilum | 544000 |
| **Frisørsalongin MidWay** | 15% | | 213055 |
| **HA-bilar** við Hallur Berg | 10% | Av arbeiðsløn upp á bilumvælingar | 220021 |
| **Salong Aura** | 15% | Av arbeiðsløn, hárviðgerð | 215499 |
| **Nest,** kafé og matstova | 10% | Av øllum mati | 308888 |
| **Ursmiðjan** | 10% | Av øllum brillum | 332024 |
| **GRANT** vindeygu og hurðar | 10% | Av øllum vørum | 355000 |
| **Carrent.fo** Vága Floghavn | 10% | Av øllum leigubilum | 783000 |
| **TATink v/Tummas Albert** | 20% | Av arbeiðsløn upp á bilumvælingar | 551133 |
| **Smiðjan** | 10% | Av øllum mati | 588184 |
| **Tannlæknastovan í Sandav.** | 10% | Av protesum og útvaldum tannviðgerðum, sum ikki fáa almennan stuðul | 332726 |
| **Fiskastykkið** | 10% | Av øllum mati | 289834 |
| **Handilsvirkið Niclasen** | 10% | | 332001 |
| **Hotel Vágar** | 10% | Av gistingum (uttan morgunmat) Kota: PENSJÓN10 ella ring 309090 | 289834 |
| **Gásadalsgarður** | 10% | Av øllum mati | 277013 |

## Í Sandoy

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Búrhandilin** | 10% | Av tógvi og gávulutum | 361519 |

## Í Suðuroy

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Richard B. Thomsen & Søn Timburhandil A/S** | 20% | Við kontantsølu | 661000 |
| **Glasstovan á Tvøroyri** Tvørávegur 25 | 10% | Av øllum mati | 790064 |

# Í Norðoyggjum

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Linsan Optik**<br>Stoksoyrarvegur 15 Klaksvík | 15% | Av brillustellum og -gløsum | 313133 |
| **Sjómansheimið**<br>Hotel Klaksvík | 10% | Av leigan av kømrum | 455333 |
| **JAP,** klædnabúð | 10% | | 456880 |
| **Vera Klipt** | 10% | Av allari hárviðgerð | 455677 |
| **Hvíthús** | 10% | Av klædnavørum | 455353 |
| **Seymistovan Hei-Mai** | 15% | | 457162 |
| **Leivur Ellingsgaard** | 10% | Ur, gull, silvur, brillur | 455203 |
| **Hjá Skós** | 10% | Av øllum skóm | 455057 |
| **Angus Steakhouse** | 10% | Av øllum mati mánadagar | 457777 |
| **El-in** | 5% | Av øllum vørum, undantikið tilboðsvørum | 284513 |
| **Norðoya Litbúð** | 15% | | 457300 |
| **Klaksvíkar Autolakering** | 10% | Av øllum vørum | 458787 / 288787 |
| **Bil & Dekkverkstaðið**<br>Við John Heinesen | 10% | Av øllum billutum | 456959 / 217861 |
| **Kósabúðin** | 10% | Av øllum vørum | 455000 |

# Í Eysturoy

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Diana** | 10% | Av øllum hondarbeiði og ítrivsvørum uttan toy til føroyska búnan, seymimaskinum og lampum | 448125 |
| **Ur og brillur** | 10% | Av øllum brillum | 447950 |
| **Rokoko,** klædnahandil | 10% | Av øllum klæðum | 441039 |
| **Brá,** mótahandil | 10% | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 422727 |
| **Shari,** mótahandil | 10% | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 454646 |
| **Skósøla** við Terje Hansen | 10% | Av øllum vørum | 441018 |
| **Josi,** klædnahandil<br>Við S. Danielsen | 10% | Av øllum klædnavørum og skóm | 441450 |

# YVIRLIT YVIR PENSJÓNISTA- OG ELDRAFELØGINI Í FØROYUM 2024

**Landsfelag Pensjónista**
**Løkjatún 1, 160 Argir, tlf. 219394,**
**t-post: lp@eldri.fo,**
**heimasíða: www.eldri.fo**

**Limafeløgini:**

**1. Pensjónistafelagið Hugni**
Maria Olsen, forkvinna, Geilin 34, 700 Klaksvík,
tlf. 282171, t-post: faroetek@hotmail.com
Limatal: 110. Felagið stovnað: 19.10.1971

**2. Eldrafelagið Fjallið**
Mai-Britt Jacobsen, forkvinna,
við Ánna 52, 512 Norðragøta, tlf. 280123,
t-post: vidanna52@gmail.com
Limatal: 153. Felagið stovnað: 18.03.1991

**3. Eldrafelagið Borgin**
Toftagøta 9, Fuglafjørður,
Áshild Kristiansen, forkvinna, Fjalsvegur 6,
530 Fuglafjørður, tlf. 214621 og 580025,
t-post: ashild.kristiansen@skulin.fo
Limatal: 170. Felagið stovnað: 16.02.1985

**4. Oyndarfjarðar Pensjónistafelag**
Jørmund L. Juul, formaður, Tartavegur 5,
690 Oyndarfjørður, Tlf. 211918,
t-post: jljuul@olivant.fo
Limatal: 16. Felagið stovnað: 02.10.1991

**5. Eldrafelagið á Toftum**
á Kneysum 14, Toftir, Alfred Olsen, formaður,
Rókavegur 24, 656 Saltnes,
tlf. 447960 og 210960,
t-post: 1947ao@gmail.com
Limatal: 80. Felagið stovnað: 09.09.2015

**6. Eldrafelagið Nón**
Torvgøta 2, 600 Saltangará,
Johild Joensen, á Byrgisheyggi 5, 627 Lamba,
tlf. 448738 og 288738,
t-post: johildjoensen@outlook.com
Limatal: 178. Felagið stovnað: 16.09.1987

**7. Eldrafelagið Kumlá**
Elias Hansen, formaður,
Skálavegur 92, 480 Skála, tlf. 441188,
t-post: eliassonja@gmail.com
Limatal: 45. Felagið stovnað: 15.02.1992

**8. Pensjónistafelagið í Sjóvar Sókn**
Petur Jákupsson, formaður,
Skúlavegur 4, 490 Strendur,
tlf. 257987
t-post: pj0106d7@skulin.fo
sigrunandreasdanielsen@gmail.com
martin@olivant.fo
Limatal: 80. Felagið stovnað: 24.10.1988

**9. Eldrafelagið á Eiði**
á Brekkuvegi 26, Jóhanna á Fløtt, forkvinna,
Úti á Bø 28, 470 Eiði, tlf. 224809,
t-post: olavurflott@gmail.com
annvor.jacobsen@gmail.com
Limatal: 68. Felagið stovnað: 26.03.2009

**10. Sunda Pensjónistafelag**
Blákollan, Hornavegur 10, Oyri.
Vibeke Ingvarsson, forkvinna,
Norðskálavegur 36, 460 Norðskáli,
tlf. 267346 og 422226.
t-post: v_ingvarsson@hotmail.com
Limatal: 67. Felagið stovnað: 03.02.1985

**11. Pensionistafelagið í Havn**
Bridgehúsið í Gundadali, Hoydalsvegur 21,
100 Tórshavn. Hilda Thomsen, forkvinna,
Magnus Heinasonargøta 4, 100 Tórshavn
Tlf. 213722 , Pfh, tlf. 284881,
t-post: pfh@eldri.fo
Limatal: 490. Felagið stovnað: 20.05.1976

**12. Eldrafelagið Vesturskin**
Páll Hellu, formaður,
Niðari Vegur 69, 350 Vestmanna, tlf. 252054
t- post: hellupall@gmail.com
Limatal: 97. Felagið stovnað: 28.05.1984

**13. Vága Pensjónistafelag**
í Ivanshúsi, c/o.Vesturvón,
Kálvalíðvegur 2, Miðvágur,
Erhard Jacobsen, formaður,
Kjóadalsvegur 12, 370 Miðvágur,
tlf. 596147,
t-post: erhjac@gmail.com
Limatal: 167. Felagið stovnað: 30.11.1981

**14. Pensjónistafelagið Kvøldarsól**
Anna Bjørg Leo, forkvinna,
Garðavegur 7, 240 Skopun, tlf. 229827,
t-post: annabjorg2@msn.com
Limatal: 35. Felagið stovnað: 29.04.1982

**15. Pensjónistafelagið HØFT**
Jens Johannesen, formaður,
Heiðatrøðin 5A, 800 Tvøroyri,
tlf. 571770 og 371770,
t-post: jaj@kallnet.fo
Limatal: 31. Felagið stovnað: 28.12.1981

**16. Pensjónistafelagið í sunnaru helvt av Suðuroy**
Ingeborg Vinther, forkvinna,
Geilin 38, 900 Vágur, tlf. 573427,
t-post: vinther@mail.fo
Limatal: 60. Felagið stovnað: 19.09.1985



# Eldri

## Landsfelag Pensjónista


Løkjatún 1 • FO-160 Argir
Tel: 21 93 94
T-postur: lp@eldri.fo
www.eldri.fo